## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FÓLKADRÁP ELLA GRINDADRÁP

Kári á Rógvi, løgtingsaður, kundi rættiliga fingið oyrini í maskinuna fyri Holocaust-teldupostin, hann sendi einum týskum fanatiskum umhvørvisaktivisti.

Vit kunnu skjótt verða samd um, at tað ikki er serliga smart, at ein løgtingsmaður sendir slíkar insinuerandi mailar til umhvørvisaktivistar.

Men. Og her er eitt stórt MEN. Hví kunnu vit ikki skjóta aftur, tá vit vit fáa so nógvar so ljótar og so niðrandi mailar um okkum, sum ikki virða hvala-mannarættindi? Vit her á redaktiónini fáa helst allar teir mailar, sum Kári á Rógvi og uttan iva øll hini tingfólkini fáa. Tá Miðlahúsið hevði Lars Løkke Rasmussen á vitjan í februar í fjør segði hann, at forsætismálaráðið hvønn einasta dag fær fleiri grindamótmæli - og at grindamótmæli eru tað, sum fyllir mest í forsætisráðnum viðvíkjandi Føroyum. So onkustaðni hava hesi grindamótmæli týdning, hóast hesi fólk tykjast rættiliga marginaliserað - at tey helst næstan ongastaðni verða tikin fyri fult.

Vit upplivdu tað her á redaktiónini í summar, at hesin sami týski »umhvørvisfelagsskapurin« ringdi til blaðstjóran og spurdi, um tað passaði, at sandingar høvdu hildið eini grind um náttina, og ikki dripið hana fyrr enn morgunin eftir. Jú, tað passaði, kundu vit vátta. So varð spurt, um tað passaði, at hvalirnir vórðu bundnir til bátarnar alla náttina? Tá fór blaðstjórin at flenna, og royndi at greiða frá, at tað hevði verið ein ómøgulig uppgáva...

Tað er á slíkum støði, tað gongur fyri seg. Vit hava eisini fleiri ferðir - mest sum til stuttleika speirikið týskarar og onglendingar við, at tá teirra lond eru hildin uppat við at drepa fólk, so kunnu tey koma aftur at diskutera við okkum um grind. Tá verða tey fámælt, tí hetta kann ikki samanberast. Nei, tað kann ikki samanberast, at onglendingar og týskarar drepa fólk, meðan almennu Føroyar, sum ikki hava dripið fólk síðani skælingssystkini vórðu avrættað á Krákusteini í 1706 – við at drepa grind...

Danmark sendir eisini sína landsmenn í deyðan. Higartil eru eini 40 ungir danir sendir í deyðan í Afghan-




istan, og gongst sum ætlað, so verða eini 40 ungir danir afturat sendir í deyðan har. Altso danska stjórnini ætlar, at kríggið í Afghanistan skal kosta umleið 80 ungum dønum lívið.

Jú, onkur mótmælir. Vit vildu sæð ein umhvørvisfelagsskap ella mannarættindafelagsskap, sum setti lond sum Danmark, Týskland, Ongland og onnur lond, sum drepa fólk, á svartalista. Tá manndrápið er steðgað, so kunnu vit diskutera grindadrápið.

Ókey, tað er ikki rætt at arga við Holocaust. Men tað so avgjørt rætt at seta lond, sum ganga inn fyri fólkadrápi upp ímóti londum, sum tildømis drepa grind og ikki hava dripið fólk í yvir 300 ár!

**›› Komið aftur, tá tykkara lond ikki drepa fólk meira!**

## Dimma gjørdi ein Gerhard




Stóra søgan hjá Dimmalætting hesa vikuna er, at blaðið heldur, at vit gjalda listarfólki alt ov nógvar pengar fyri einki at gera.

Tað var annars tann bersøgni javnaðartingmaðurin, Gerhard Lognberg, sum var úti við líggjanum og segði, at starvslønir til listarfólk eiga at verða avtiknar.

Dimmalætting heldur eftir øllum at døma, at tað líkist ongum, at Jóanis Nielsen og Carl Johan Jensen kunnu



nassa sær almennar milliónir fyri at hugna sær – uttan at nøkur krøv verða sett.

Spurningurin er so, um Dimmalætting og Gerhard Lognberg hava rætt, og um Løgtingið eigur at avtaka starvslønirnar, soleiðis at listarfólkini mugu út at »gera okkurt ordiligt arbeiði«, ella um kanska blaðstjórarnir á Dimmalætting og Gerhard Lognberg ikki eru nóg mentað til at skilja týdningin av at nøra um mentanina.

Vit skulu ikki á hesum stað skera ígjønum, men lata spurningin standa opnan...



**›› Meira um krakkaveldið**

THOMAS ARABO
KJAK Á SÍÐU 24



**›› Ágangur móti fiskavirkisskipan**

INGEBORG VINTHER
KJAK Á SÍÐU 17

## Veika kjakmentan

Telduposturin hjá Kára á Rógvi, løgtingsmanni og doktara í lóg, sigur okkum nógv um føroyska kjakmentan.

Á Rás2 í gjár vildi Rigmor Dam vera við, at slíkar argumentatiónir vísa, hvørja avskeplaða mynd føroyingar hava av okkum sjálvum og okkara søgu. Hon vísti á, at vit hava tað best og síggja best okkara samleika, tá vit hava onkran, sum er ímóti okkum. Er tað ikki Danmark, so er tað onkur annar, sum til dømis onkur umhvørvisfelagsskapur.



– Vit eru best, vit duga best, vit eru klókari, og vit lesa søgur um raskar skiparar og um menn, sum tóku land og um matar bøndur og so víðari, segði hon.

Eirikur Lindenskov vísti á, at vit eru faktiskt beinleiðis handikappað, tá tað kemur til at argumentera og at luttaka í einum sakligum kjaki.

– Fakliga eru vit heldur ikki nóg búgvin. Fyri at siga tað bart út, so hava vit ikki nóg nógvan kunnleika, tí føroyska samfelagið hevur ikki prioriterað til dømis eitt so gott skúlaverk, at einhvør føroyingur klárar at skriva eina A4 síðu á enskum ella týskum máli, sum greiðir evropearum frá um okkara hugsan um grindadráp.

Vit hava stórar mentanarligar trupulleikar í so máta, sum vit eiga at taka í nógv størri álvara, enn at lesa um gamlar garpar og hetjur og fosturlandssangir. Hetta eiga tey, sum ráða fyri borgum at gera nakað við.

Vánaligu Pisa-úrslitini siga í veruleikanum nokso nógv. Tí skulu vit prioritera skúlaverkið nógv hægri og geva skúlanum nógv betri umstøður.

Vitan og lærdómur hava so ómetaligan týdning fyri okkara samleika og fyri at yvirliva sum tjóð!

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*